

*Delta er St. Bernhard-hundur. Børnini flokkaðust um henda ógvusliga, men sera góðsliga hund*



*Petra slapp ein ríðitúr á kálvinum*



*Margretha seldi kaffi, køkur og góðgæti - og kaffi smakkaði stak væl í deyminum frá køstinum*



*Heidi Vágsá eigur henda vakra dalmatinaran. Tað hava verið hundar av hesum slagnum í landinum fyrr, men Heidi veit ikki um nakran annan í løtuni*

# Djór hittast í Klaksvík

**Leygardagin skipaði Norðoya Rossafelag fyri djóradegi í Klaksvík. Í einum fjósi á Uppsølum hevði felagið savnað um 20 ymisk sløg av djórum**

DJÓRADAGUR

*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Tað var næstan sum í Nóa Ark í fjósinum hjá Magnus Mikkelsen leygardagin, har eini 20 ymisk sløg av djórum vóru savnaði.

Har vóru hestar, kálvar, fleiri sløg av hundum og kettum, dunnur, mini-froskar, kaninir, kanariufuglar - og enntá ein papageykur, sum dugir at tosa.

Tað var Norðoya Rossafelag, sum skipaði fyri framsýningi. Felagið varð stovnað í 2000 og er í menning, sigur Ólavur Jóhannesen, formaður.

**Væleydnað tiltak**

Í fjør gjørdi felagaði av, at felagsfjós skuldi byggjast, og søkt varð um grundøki á Norðoyri.

- Enn er ikki alt greitt, men vit rokna við at fáa økið til keyps, sigur Ólavur.

Djóradagurin leygardagin var eitt lið í arbeiðnum hjá felagnum at savna pening til fjósið. Ætlanin er, at fjósið skal rúma 20 rossum.

Djórini, sum vóru við á framsýningini, høvdu eigararnir latið felagnum til láns ókeypis.

Framsýningin var væl vitjað, og fyriskipararnir eru sera vælnøgdir við undirtøkuna.

- Hetta fara vit at gera aftur eina aðru ferð, møguliga á norðoyastevnu, siga tey.

*Børn sluppu inn fyri 15 krónur, meðan vaksin máttu gjalda tað dupulta. David, Jóan Magnus og Jákup hildu, at ein mynd av damunum hevði verið meiri spennandi - men tað veldst nú um eyga, sum sær*





*Lítli Birgir heldur, at tann gráa persarakettan er ljót. - Men hin gula er fitt, sigur hann*



*Nógv munnu børnini vera, sum droyma um at eiga ein hest, men tað er ikki bara sum at siga tað, at fáa sær eitt slíkt djór at passa. Bogi Tróndheim var millum mongu børnini, sum sluppu á hestbak leygardagin*



*Polly tekur øll orð uppaftur. Henda dagin framsýningin var, rópti hann stútt: "Mamma, mamma!"*